## Raðhús í Leirvík

Leirvíkar kommuna og smápartafelagið Snið skriva í dag undir sáttmála um raðhúsabygging í bygdini. Smápartafelagið Snið, sum Fuglø Arkitektar í Klaksvík og J+H Smíð í Leirvík hava stovnað, skal keypa tvey stykki við Bólstein í Leirvík, og har fer felagið at byggja millum 12 ella 14 raðhús, skrivar Norðlýsið. Leirvíkar kommuna lýsti stykkini til sølu fyrr í ár til at byggja raðhús á, og tey verða nú seld Sp/f Snið.

## Spyr um lesiveik

Løgtingið hevur samtykt, at Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður, skal svara einum fyrispurningi frá løgtingsmanninum Kára P. Højgaard um ymisk viðurskifti í sambandi við lesiveik børn. Tingmaðurin sigur, at fleiri foreldur velja at senda lesiveik børn til Danmarkar fyri egna rokning, og hann vil hava at vita, um tað er rímiligt. Tingmaðurin spyr eisini, hvat tað almenna ger, fyri at lesiveikleikin kann staðfestast sum tíðliga sum gjørligt.

Løgregla :

# Átta mans klárir at leypa á

Tað var aftur ófriðarligt í Havnargøtum sunnunáttina. Í einum føri var ein maður bæði sparkaður og sligin í einum bardaga, meðan ein annar mátti flýggja undan ikki færri enn átta álopsmonnum.

Klokkan var farin av hálvgum fýra sunnumorgunin, tá løgreglan fekk boð um ein bardaga í miðbýnum.

Tveir ungir mans høvdu lagt á ein annan, og høvdu so bart hann til. Teir bæði slógu og sparkaðu hann um allan kroppin.

Maðurin var varð síðani fluttur á Skaðastovuna til kanningar.

Løgreglan hevur verið í samband við vitni sum sóu tilburðin, og søgdu seg haraftrat kenna teir báðar ungu menninar.

Í einum øðrum føri var komið til ilnar millum ein mann og ein bólk av átta øðrum monnum, sum ætlaðu at leggja á hann.

Hesin flýddi inn í eina av matstovunum í miðbýnum, men tordi ikki útaftur fyri teimum átta. Tað gjørdi hann ikki fyrrenn løgreglan kom á staðið og fekk hann í tryggari umstøður.

Upplýst verður, at løgreglan kennir væl tann eina mannin í bólkinum, og sum ikki er ókendur í slíkum málum.

**sb.**

### *Sjáldsom samlisjúka:* Nummarplátur á løgreglubilum

Summi savna frímerki, telefonkort og bilar. Onnur savna aðrar lutir, til dømis nummarplátur.

Øðrvísi kann tað ikki tulkast, tá nummarpláturnar vórðu tikin av einum løgreglubili, sum var í tænastu, leygarkvøldið.

Av Politistøðini í Havn verður upplýst, at ein sivilur løgreglubilur stóð parkeraður við Smyrilsvegin í Havn hetta kvøldið.

Tá teir komu til bilin stutt undan midnáttarleitinum kundi løgreglan bert staðfesta, at onkur var farin avstað við nummarplátunum.

Enn er eingin handtikin fyri hetta brotið.

**sb.**

# Ólógligt handvápn á Havnargøtum

**Løgreglan handtók sunnunáttina ein ungan mann sum gekk við einum knúgvajarni uppi á sær, og helst ætlaði at brúka tað**

VÁPN
*Snorri Brend*

Sambært Vápnalógini er hvørki loyvt at eiga ella brúka slík knúgvajørn, uttan serstakt loyvi.

Hesin ungi maðurin gekk kortini við einum slíkum kring knúgvarnar. Men løgreglan tók mannin, áðrenn hann kom í hóslag við nakran við hesum sera vandamikla vápni. Slíkt hevði, í ringasta føri, verðið mett sum harðskapur av grovasta slagi.

Av Politistøðini í Havn fekk Portalurin upplýst sunnumorgunin, at maðurin nú verður skuldsettur fyri brot á vápnalógina.





*Knúgvajørn eru ikki at spæla við*

- Hevði hann sligið við knúgvajarninum hevði álvarsamur skaði staðist av hesum, verður sagt.

Knúgvajørn eru framleidd úr metalli, og eru skapað soleiðis at tey passa kring knúgvarnar.

Skapið á tí er soleiðis, at tað ger munandi størri skaða enn ein vanligur knýttnevi, um ein rakar andlitið.

# Satt ragnarok leygarnáttina




**Ofta kann vera ófriðarligt í miðbýnum eitt leygarkvøld. Men í seinastu leygarnátt var millum tær ófriðaligastu næturnar sum menn vita um at siga. Tað tyktist ta einu løtuna sum var miðbýurin eitt "massa-slagsmál", allur sum hann var**

POLITI
*Snorri Brend*

0Av Politistøðini í Havn varð upplýst leygarmorgunin, at minst trý mál um harðskap høvdu verið um náttina. Helst var talan um eitt fjórða mál eisini.

Í tí eina førinum hevur ein persónur tveitt eina fløsku í andlitið á einum øðrum.

Løgreglan hevur tikið onkur av gerningsfólkunum, og hevur annars onnur vitni til okkurt málið.

Neyðugt var at fáa tann eina persónin á skaðastovuna á Landssjúkrahúsinum til viðgerð. Men hóast hetta var bardagin ikki liðugur. Av Landssjúkrahúsinum var tí ringt aftur til Politistøðina, tí neyðugt var at boðsenda løgregluni at skilja partarnar enn einaferð.

Sagt verður, at teir á Politistøðini høvdu gjørt seg væl út til arbeiðið í nátt, nú tey fyrstu jólaborðhaldini vóru.

Vanliga eru teir fimm mans til arbeiðis eitt slíkt kvøld, men høvdu tó innkallað tríggjar aftrat frammanundan. Men hóast hetta, stóð á hjá teimum at loysa allar uppgávurnar í nátt. Serliga nógv var at gera millum kl. 3 og hálvgum seks í morgun.

- Vit vórðu snøgt sagt noyddir at avvísa fleiri uppgávur, tí fólk var ikki til tað, sigur Vakthavandi við Portalin.